# Verkætlan
# um
# KT-politikk úr foreldra- og brúkarasjónarhorni.


1. Inngangur ... 1
2. Problemlýsing ... 1
3. Verkætlan ... 2
   3.1 Verkligi parturin ... 2
      3.1.1 Málsetningar ... 2
      3.1.2 Námsfrøðiligi parturin í sjálvari verkætlanini ... 3
      3.1.3 Leiðslan og skúlin ... 3
      3.1.4 Verkligi parturin – lýsing av arbeiðsgongdini ... 3
      3.1.5 Hugskotið um samskifti ... 3
      3.1.6 Heimasíðan ... 4
      3.1.7 Leiðslan ... 5
      3.1.8 Teldan í skúlastovuni hjá 5.b ... 5
      3.1.9 KT-depilin ... 5
      3.1.10 Næmingarnir ... 6
      3.1.11 Foreldrini ... 7
      3.1.12 Fast ”chatt” kvøld ... 7
      3.1.13 Ráðstevnurnar ... 8
   3.2 Námsfrøðiligi parturin ... 12
      3.2.1 Brot úr fólkaskúlalógini ... 12
      3.2.2 Kunningartøkni í fólkaskúlanum ... 13
      3.2.3 Nøkur orð um foreldrasamstarv ... 16
4. Eftirmeting ... 18
5. Endi ... 18
6. Keldur ... 20

## 1. Inngangur

Í 1993 var eg boðin at verða við í TESS verkætlanini, ið táverandi Danmarks Lærerhøjskole skipaði fyri. Høvuðstankin var, at í “Skúlanum fyri øll” var teldan eitt sera hent amboð og roynt var at samskifta millum næmingar og næmingar, lærarar og næmingar og lærarar og lærarar. Hetta var so við til at geva fleiri góð hugskot um at samskifta elektroniskt, men tað eydanðist ongantíð at royna hetta til fulnar, tí at telduútgerðin væntaði. Seinni var eg við í einari nevnd í Runavíkar Kommunu, ið skuldi endurskoða skúlabygnaðin í kommununi. Hetta arbeiði tók eitt ár, og fekk ein tá betri innlit í, hvussu alt hongur saman sæð frá peninga-játtandi myndugleikunum. Í hesum sama tíðarskeiði hevur fólkaskúlin verið fyri stórari broyting: KT skal nú verða tikið við í allar lærugreinir sambart “Álit um nýggja fólkaskúlalóg” sí §5. KT-depilin er settur á stovn, og lærarar í fólkaskúlanum hava tikið KT-kort fólkaskúlans. Eitt ávíst tíðarskeið varð stuðul latin frá skúlamyndugleikununum til teldukeyp. Misjavnt var tó, hvussu hesin stuðul varð nýttur av ymsu kommununum, og tí fekk eg hug at royna hesa verkætlan, sum vónandi kann verða ein positivur háttur at fáa gongd á teldunýtsluna innan skúlans gátt. Um foreldrini saman við børnum teirra og skúlanum fáa positivar royndir við at samskifta við skúlan elektroniskt, umframt sum fyrr á foreldrafundum og til foreldraviðtalu, so gerast hetta vónandi til “ringar á vatninum”, sum kunnu verða við til at stuðla hesum, at allir skúlar fáa hóskandi telduútgerð.

## 2. Problemlýsing

Hugsanin við evninum ”KT-politikkur úr foreldra- og brúkarasjónarhorni” var út frá okkara fortreytum á Glyvra skúla at gera eina roynd í at fáa samskift við foreldrini um KT sum heild í skúlanum og at lata næmingarnar í 5.b, foreldur teirra, lærarar og leiðslu skúlans fáa eitt innlit í, hvussu hetta kann gerast. Nakrar royndir muga jú til, fyri at foreldur og brúkarar kunnu fáa ein *politikk*.

Ein heimasíða skuldi gerast til 5.b, sum skal nýtast sum útgangsstøði fyri hesi verkætlan. Av heimasíðuni er møguleiki fyri at skriva lærarum og næmingum floksins E-post, og eisini er møguleiki fyri at taka niður forritið FirstClass, ið er ein ráðstevnuskipan, sum ætlanin er, at allir skúlar í Føroyum skulu hava sum útgangsstøði fyri samskifti um Internetið um skúlaviðurskifti. Næmingarnir og foreldrini fingu hvør sína ráðstevnu í FirstClass og lærdu at gera brúk av samskiftismøguleikunum, ið forritið gevur.

Ætlanin við hesi verkætlan er at lýsa:

- Hvussu kann samskifti um Internetið verða við til at styrkja sambandið millum heim og skúla?

## 3. Verkætlan

Innihaldið skal fevna um 2 høvuðspartar, ein verkligan part, sum viðgerð sjálva arbeiðsgongdina og ein námsfrøðiligan part, sum viðgerð samarbeiði millum heim og skúla og kunningartøkni í fólkaskúlanum. Hesir partar koma tó partvís at ganga inn í hvørt annað sum ein heild. Út frá royndunum er so ætlanin at gera eina eftirmeting og eina niðurstøðu, sum viðgera, um hetta kann verða ein gongd leið.

### *3.1 Verkligi parturin*

Verkligi parturin verður bygdur upp við at gera málsetningar og síðani viðmerkingar til hesar málsetningar, so hvørt sum hesir verða royndir. Hendan arbeiðsgongd verður síðani lýst í sjálvari verkætlanini.

#### 3.1.1 Málsetningar

- Heimasíða má gerast til 5.b við leinkju til First Class. Innihald á heimasíðuni kann verða: ársætlan, tímatalva, frídagar, myndir av næmingunum frá útferðum o.a. E-mail adressa hjá næmingunum og tveimum lærarum flokksins skulu verða á heimasíðuni.

- Foreldrini mugu kunnast um royndina, ið skal verða frá 1.desember 2000 – 1.mars 2001. Foreldur og næmingar fáa høvi at samskifta elektroniskt, hetta við støði í skúlalógini frá 1997 §2 og skt.2 og 3.

- Foreldur og næmingar fáa E-mail adressu í First Class, gerast brúkarar og fáa loyniorð.

- Ein ráðstevna skal eisini gerast til foreldur og ein til næmingar.

- Telda má setast upp í skúlastovuni hjá 5.b við Internet sambandi.

- Flokslærarin, næmingar og foreldur gera avtalu um javnan at hyggja í

elektroniska postkassan.

- Góð hugskot, kunning um ymiskt á skúlanum og góðar heimasíður mugu javnan leggjast út til næmingarnar og foreldur.

### 3.1.2 Námsfrøðiligi parturin í sjálvari verkætlanini

- Hevur tað týdning at hava gott samstarv millum heim og skúla – og javnan? Hvønn mun kann hetta gera?

- Hvussu kunnu foreldrini fáast við uppá slíkt hugskot, hvørji viðurskifti skulu verða í lagi?

- Krøv og støði í samband við eitt elektroniskt samstarv millum heim og skúla.

- Hevur telduútgerðin námsfrøðiligan týdning fyri samstarvið?

- Hvussu verður hjálp veitt brúkarunum í hesum samstarvi?

- Hvussu fáast næmingarnir í gongd og við tí telduútgerð, sum vit hava á skúlanum?

### 3.1.3 Leiðslan og skúlin

- Hevur tað týdning at samstarva við leiðsuna um eina slíka verkætlan? Hvussu kann tað gerast?

### 3.1.4 Verkligi parturin – lýsing av arbeiðsgongdini

#### 3.1.4.1 Samskifti um Internetið millum heim og skúla.

Tá tú sum lærari kemur á tal við foreldur um teldunýtslu í skúlanum, so halda foreldur, at teldan sjálvandi eigur at verða tikin við inn í undirvísingina, men grundgevingarnar eru ikki so nógvar. Fólk vita, at teldan kann verða eitt hent amboð, men júst í hvørjum høpi tikist verða verri at lýsa. Hetta er eisini galdandi fyri lærarar innan skúlans gátt. Lærarar í Føroyum hava fingið KT-kort fólkaskúlans, men hvussu koma vit sum lærarar víðari á hesum økinum á skilabestan hátt, - ja, svarini eru helst fleiri.

### 3.1.5 Hugskotið um samskifti

Hugskotið um at fara undir júst hesa verkætlan - at kunna styrkja samskifti millum heim og skúla um Internetið - fekk eg frá Frank Bach Jensen, Orfeus – Uni-C, ið hevur fingist nógv við at gera teldutøkt undirvísingartilfar og at

undirvísa í teldunýtslu innan skúlans gátt. Líknandi royndir eru gjørdar í Danmark og í Íslandi, men har vóru fleiri lærarar, skúlar og næmingar við í royndunum. Hóast tað, so gjørdi eg av at fara undir hesa verkætlan sjálv, men við góðum stuðli frá arbeiðsfeløgum á KT-deplinum og í Runavíkar skúla.

Eftir at hava lagt hugskotið fram fyri teimum, ið skipa fyri telduvarða-útbúgvingini og vegleiðara mínum, so varð fyrsta stigið í hesi verkætlanini at spyrja nýggja flokslæraran í 5.b, um hann saman við flokkinum vildi verða við í hesi verkætlan. Tað fekk góða móttøku, og ársætlanin fyri flokkin, sum tá var í gerð, kom eisini at umfata verkætlanina. Síðani gekk leiðin til leiðsluna, og her fekk hugskotið eisini góða móttøku. At enda vórðu fyrst næmingarnir og síðani foreldrini spurd. Næmingarnir fingu eina frágreiðing um verkætlanina í skúlanum, og eg spurdi tey eisini, hvussu nógv teirra høvdu teldu og Internetsamband við hús. 17 av tá 21 næmingum høvdu hetta. Síðani eru tveir næmingar avtrat komnir í flokkin, men hesi hava teldu og Internet, umframt at onkur avtrat í flokkinum í hesum tíðarskeiðnum hevur fingið Internetsamband ella hevur funnið onkra aðra loysn, fyri at sleppa at verða við í gongdini. Á fyrsta kunnandi foreldrafundinum um heystið fingu foreldrini so eina frágreiðing um verkætlanina og ætlaðu royndartíðina frá 1.desember til 1.mars og vórðu spurd, um tey vildu stuðla børnum teirra og mær í hesum arbeiði. Eg lovaði foreldrunum at læra tey at gera brúk av heimasíðuni, sum ætlanin varð at gera flokkinum, umframt FirstClass ráðstevnuskipanini, um hetta hevði teirra áhuga. Síðani varð eisini tosað eitt sindur um *málið við verkætlanini, ið var at styrkja samskiftið millum heim og skúla.* Foreldrini vóru sum heild sera positiv, onkur nevndi eitt sindur um, at tey høvdu hoyrt um onnur foreldur, sum høvdu fingið ovurstórar Internet-rokningar, tí at børn teirra vóru so nógv á Internetinum. Vit fingu so eitt prát um hetta og eisini um, at eingin mátti kenna seg tvingaðan at verða við, heldur ikki at skaffa sær nakra telduútgerð til hesa royndina, men at tey, ið ikki høvdu møguleikar við hús, skuldu kenna seg sera væl at verða við alíkavæl á skúlanum, og at børn teirra kundu vitja hvønn annan tey kvøldini, vit gjørdu av at "chatta", so at tey eisini kundu kenna seg at verða við og kunna práta uppí.

### 3.1.6 Heimasíðan

Tá ið nú vissa varð fingin fyri, at hesi fyrstu viðurskiftini vóru í lagi, so varð næsta stigið *at gera flokkinum eina heimasíðu*. Heimasíðan er sera einføld og gjørd uttan størri hegni. Hon finst undir heimasíðuni hjá Runavíkar Kommunuskúla á www.rks.fo so næmingar og 5.b Heimasíðan er um 5.b og er bygd upp soleiðis: ein forsíða við mynd av næmingunum og knappum til hinar síðurnar, ein síða er um verkætlanina við nærri frágreiðingum, ein síða er við

tímatalvuni og ársætlanini, og sum eisini kundi havt lesiætlanina fyri flokkin, ein síða er, har møguleiki er fyri at senda lærarunum og næmingunum E-post við hjálp av leinkjum. Ætlanin varð eisini at leggja fleiri myndir av ymiskum tiltøkum í flokkinum og í skúlanum á heimasíðuna so hvørt, men eg má viðganga, at tíðin strekti ikki til øll hugskotini.

Heimasíðan er gjørd í forritinum FrontPage og løgd á servaran í Runavíkar skúla, og við tað at eg havi forritið FrontPage á mínari teldu við hús og eina ”administratorkodu” til servaran, so fái eg redigerað heimasíðuna heimanífrá. Tað at gera heimasíðu, krevur hugflog, tíð, venjing og helst onkran at ”diskutera” við. Kanska átti skúlin at havt ein “leist” at gera floksheimasíðu eftir, umframt eitt stutt skeið fyri at lætta um hjá lærarum, ið ynskja at gera hetta.

### 3.1.7 Leiðslan

Síðani tosaði eg aftur við leiðsluna, hesaferð um at fáa eina teldu og internetsamband inn í stovuna hjá 5.b. Vit kundu fáa eina gamla teldu, sum er arvað frá kommununi, tí skúlaárið var so nógv útliðið, at ikki var nóg mikið eftir á skúlakontoini til eina nýggja teldu. Vit tosaðu eisini um, hvussu sambandi til Internetið skuldi verða, og av tí at ætlanin og ynski frá skúlanum er at fáa net og fast samband til Glyvra skúla í ár 2001, so helt eg, at vit kundu noyðast við uppringt samband í fyrsta umfari. Hetta skuldi jú verða ein roynd í eina avmarkaða tíð.

### 3.1.8 Teldan í skúlastovuni hjá 5.b

Teldan, sum hevði verið á neti hjá kommununi, var síðani sett upp í skúlastovuni, men hon hevði einki modem og einki ljóðkort, so hetta var umbiðið. Telefonlinja var løgd upp til stovuna frá bókasavninum eftir drúgva diskussión við leiðsluna og bókasavnsvørðin, um hetta mundi fara at kosta bókasavninum ov nógv. Eftir at eg hevði sett modem og ljóðkort til telduna, sum (sjálvandi) ikki var tað rætta fyrstu ferð, tað kom sendandi við posti frá forhandlaranum, hóast tey fingu rættar upplýsingar og kendu telduna frá kommununi, so mátti eg at enda ringja eftir teknikara, fyri at fáa telduna stillaða rætt inn, so samband kundi fáast við Internetið. Hetta vísir, hvussu tíðarkrevjandi bert hetta eina er at fáa eina teldu við Internetsambandi inn á eina skúlastovu, og prógvar at slík viðurskifti eiga at fáast í lag fyri allan skúlan í senn, um vanligi lærarin skal hava umstøður at brúka teldu í flokkinum.

### 3.1.9 KT-depilin

Í samráð við KT-depilin fekk eg brúkaranøvn og loyniorð til næmingarnar í flokkinum og bert *eitt og sama brúkaranavn og loyniorð til øll foreldrini* fyri at sleppa inn í FirstClass! Hetta gjørdust vit samd um, við tað at hetta var ein roynd í eina avmarkaða tíð, hóast eg hevði hug at geva hvørjum heimi/foreldrapari sína egnu kodur. Hetta kravdi størri umsiting og eftirtanka fyri KT-depilin, men eftir at hava roynt hesa verkætlan í eina tíð, so haldi eg, at tað hevði verið rættari, at foreldrini høvdu hvør sína. Tað hevði loyvt mær at sæð, hvussu stór nýtslan veruliga var, foreldrini høvdu kent størri ábyrgd, og eg hevði sæð, hvørjum og hvussu eg kundi hjálpt teimum at komi víðari. Sum nú er síggi eg bert, tá fyrsta foreldrið hevur verið á ráðstevnuni og *ikki* um fleiri hava fingið boðini, sum eru har. Tað sæst heldur ikki á brævi sent í foreldraráðstevnuni, hvør ið avsendarin er.

### 3.1.10 Næmingarnir

Nú skuldu næmingarnir læra at koma inn á heimasíðuna og at gera brúk av First Class. Vit máttu fara út í teldustovuna í Runavíkar skúla, tí har kunnu næmingarnir hava hvør sína teldu við føstum sambandi til Internetið, og møguleiki er fyri at vísa teimum hetta ymiska á stórskíggja. Við tað at vit kundu sleppa í teldustovuna mikumorgun, og tey høvdu flokslæraran tá, og at eg ongan skemalagdan tíma hevði tá, so gjørdu vit av at brúka hesa somu tíðina teir dagarnar, vit vildu fara í teldustovuna.

Fyrstu ferð vit vóru í teldustovuni, vóru vit í 4 undirvísingartímar út í eitt. Flokslærarin og eg vóru við flokkinum. Næmingarnir lærdu fyrst at logga inn á net skúlans. Síðani hugdu tey at nýggju heimasíðuni og royndu teir ymsu møguleikarnar har. Tey sóu eisini skannaran, og vit tosaðu um heimasíðuna, og um at tey sjálvi kundu koma við myndum at leggja inn. Síðani tóku vit ein steðg, innan farið var í gongd við at læra at brúka First Class. Hetta var 15.november, og ætlanin var, at foreldrini skuldu koma kvøldið eftir, meðan alt enn var “ferskt” hjá næmingunum, men sama kvøldið var lýst við uppstillingarfundi til kommunuvalið, so vit gjørdu best í at útseta hetta í eina viku. Tað er ikki so lætt at gera og yvirhalda eina námgreiniliga ársætlan enn!

Til First Class hevði eg gjørt næmingunum smá kort við brúkaranavni, loyniorði og E-post adressuni og bað tey goyma tey væl! Tey lærdu, at í skúlanum er First Class klienturin lagdur inn á teldurnar, og tey lærdu, hvussu tey sjálvi kundu gera tað við hús. Síðani lærdu tey at fara inn í Samhøll at senda brøv og fáa brøv, svara o.s.fr. Eg ansaði eftir, at øll fingu eitt bræv, men brúkti eisini tíð til at strika óynsktan “junkmail”, sum tíverri var komin til fleiri teirra. So lærdu tey

at “chatta”. Tað var stuttligt, hildu tey, men torført var at skilja hjá teimum, at til bar at hava fleiri “chatt” opin ísenn. At enda vísti eg teimum, hvussu tey kundu fara inn í Samhøll frá Internetinum frá www.skulin.fo , og har royndu nøkur teirra eisini eitt sindur. Næmingarnir vóru óvanir við at verða í teldustovu og gloymdu at verða friðarligir av berum ídni. Flokslærarin og eg vóru tó samd um, at hetta mátti roynast javnan, til næmingarnir dugdu at gera brúk av Samhøll. Ótrúligt at 11 ára gamlir næmingar kunnu haldast til í so langa tíð, sum henda fyrsta dagin í teldustovuni! Best hevði nú verið, um vit kundu havt 1-2 tímar hvønn skúladag til hetta í eitt samanhangandi tíðarskeið, og at teldur vóru nærhendis skúlastovuni. Men flokslærarin og eg hava roynt at tendra telduna inni í skúlastovuni mest sum hvønn dag, vit hava havt tey, og soleiðis hava vit svarað nógvum spurningum so hvørt.

### 3.1.11 Foreldrini

Vikuna eftir komu foreldrini í skúla at læra hetta sama, sum næmingarnir høvdu lært vikuna frammanundan. Hetta var eitt hóskvøld, og fleiri pápar, enn vanligt er á foreldrafundum, møttu! Bert 3 næmingar vóru ikki umboðaðir. Næmingarnir vóru ikki bodnir við, tí ov lítið pláss hevði verið. Nøkur foreldur máttu sita saman um eina teldu. Vit gjørdu av at taka eitt sindur um Internetið og um heimasíðuna hjá flokkinum - innan kaffisteðgin - og First Class/Samhøll eftir steðgin. Flokslærarin var aftur við hesa ferð, og eftir eina felags frágreiðing við hjálp av uppvørpuni, so runnu vit runt at hjálpa fólki at finna hetta ymiska. Kvøldið gekst bara væl, fólk lærdu eitt sindur, høvdu tað stuttligt og “motiveringin” var har, tí hetta var um teirra egnu børn. Í skúlahøpi var hetta ein øðrvísi og hugnalig løta at verða saman í. Ein pápi skeyt enn tá upp, meðan vit fingu okkum kaffi inni á lærarastovuni, at vit áttu at søkt um stuðul frá teimum 3-4 virkjunum, sum foreldur í flokkinum arbeiða á, til keyp av einari teldu og prentara til flokkin. Vit gjørdu eisini avtalu um, at tey vóru vælkomin at ringja til mín, um nakað var at spyrja um í hesum sambandi. Fleiri foreldur nýttu høvi til tað, og onkur hevði enntá biðið serkøn fólk um at hjálpa sær at fáa Internet uppseting og annað at rigga, so sigast má at viljin var til staðar.

### 3.1.12 Fast ”chatt” kvøld

Í samráð við foreldrini var avgjørt at “fasta chattið” hjá næmingunum og mær skuldi verða mikukvøld kl. 19.30 – 20.30, tó ikki í jólafrítíðini. Hetta hóskaði mær væl, tí eg kundi minna næmingarnar á hetta samskiftið mikumorgunin í skúlanum, og hósmorgunin kundu vit so tosa um, hvussu tað hevði gingist kvøldið fyri, og eg kundi vísa teimum á telduni inni í flokkinum, um tey høvdu nakað at spyrja um viðvíkjandi uppseting ella annað.

Síðst í november vóru vit, 5.b, flokslærarin og eg, aftur í teldustovuni í Runavík. Vit byrjaðu aftur við eini felags løtu um First Class, um at taka forritið niður, fara í postkassan, síggja hvør er inni á skipanini, senda brøv, svara brøvum og at bjóða onkrum at "chatta". Uppvørpan var aftur ein góð hjálp. Næmingarnir royndu nú hesar møguleikar, øll skuldu senda síðumanninum eitt bræv og fáa bræv aftur. Summi sendi fleiri brøv, meðan tey bíðaðu. Síðani var farið at "chatta", og tað gekk í eina góða løtu, hóast onkur spurdi, um tey nú ikki kundu fara í eitt annað "chatt" – "Mirc". At enda varð hugt at heimasíðuni, og tosað var um hana. Vit fóru út í gongina at taka eina nýggja mynd av flokkinum við digitala myndatólinum hjá skúlanum, og løgdu síðani myndina inn á heimasíðuna. Seinasta tíman sluppu tey at gera "okkurt" – spældu onkur spøl á teldunum, Super Mario o.a. Hugurin er sera góður til teldurnar má sigast! Nú vóru næmingarnir eisini væl fyri at fara undir "fasta chattið" mikukvøld.

Sama kvøldið royndu vit so fyri fyrstu ferð! 9 næmingar vóru inni á First Class, og fleiri ringdu um hjálp til uppseting og um trupulleikar annars við at sleppa inn. First Class átti at verið púra klárt at brúka, tá tað verður "downloada", einki við at fara undir "opsætning" og at broyta "server" ella annað!

Vikuna eftir fingu foreldrini bræv heim í góðum gomlum brævbjálva við gjøllari frágreiðing um, hvussu ein kann "downloada" First Class og hvat skal gerast, bæði gjøgnum "browsaran" og "klient". Eisini vóru boð givin um, at vit, flokkurin og eg "chatta" aftur tað kvøldið somu tíð sum avtala. Øll foreldrini fingu soleiðis enn einaferð boð um, at vit veruliga vóru farin undir hesa verkætlan.

Hetta kvøldið vóru 12 næmingar inni á "chattinum". Onkur gitti gátur o.s.fr., onkur pápi var vist aftanfyri og gav góð ráð! Men góð skrivivenjing er tað. Eg var uppi í "chattinum" hendan avtalaða tíman, men dagin eftir søgdu nøkur teirra, at tey hildu fram, eftir at eg var farin og at tað var *ordiliga stuttligt* – helst tí eg var farin!!!

### 3.1.13 Ráðstevnurnar

Ráðstevnurnar skuldu røkjast, og flokslærarin og eg løgdu boð á ráðstevnurnar um eitt hugnakvøld um Mikkjal av Ryggi, sum skuldi verða í ítróttarhøllini, og eisini leinkjur til teirra, har tey kundu finna ymiskt jólaprýði á Internetinum, umframt leinkjur til animatiónir og jólaløg.

Floksins heimasíða skifti lit og varð pyntað til jóla, bæði við animatiónum og

jólatónleiki. Hetta dámdu næmingunum væl, og eg bað tey vísa foreldrunum tað við, - fyri at halda endanum!! Hetta var so tikið burtur aftur sama dag, sum næmingarnir tóku jólaprýði niður í skúlastovuni. Hetta og annað var sjálvandi fráboðað í ráðstevnunum.

#### 3.1.13.1 Niðurstøða á jólum

Í jólafrítíðini hugsaði eg eitt sindur um gongdina higartil við verkætlanini og kom til tað niðurstøðu, at tað var spell, at eg ikki helt fast við, at foreldrini skuldu hava egið brúkaranavn og loyniorð, tí sum nú var, so sá eg ikki, um foreldrini veruliga gjørdu brúk av ráðstevnuni ella ikki, - eg kundi jú bert síggja, at fyrsta foreldrið hevði verið inni á ráðstevnuni, við tað at øll høvdu sama brúkaranavn.

Eftir jólafrítíðina prátaði eg við Hendrik Jacobsen á KT-deplinum um at geva foreldrunum egnar E-mail adressur, brúkaranavn og loyniorð, so betri sæst um brúk verður gjørt av ráðstevnuskipanini ella ikki. Vit gjørdust samd um, at hvørt foreldrapar/húski fekk sítt brúkaranavn og loyniorð. Navn og føðingardagur hjá øðrum foreldrinum skuldi upplýsast fyri KT-deplinum, og hetta kundi eg sjálv leggja inn við at fara inn á heimasíðuna hjá www.skulin.fo , so undir útgáva, so dátugrunnar og næmingar ella lærarar.

#### 3.1.13.2 Samskifti við foreldrini um verkætlanina

Foreldrini og leiðslan máttu tó spyrjast fyrst. Nøvnini og føðingardagarnar hjá foreldrunum fekk eg frá leiðsluni, men fleiri av “tilflytarunum” manglaðu, so tað fekk eg á tí næsta foreldrafundinum. Eg var burturstødd í arbeiðsørindum í eina viku, men eg sendi foreldrunum bræv heim og boðaði teimum til fundar í teldustovuni vikuna eftir. Evnið skuldi verða gongdin higartil, nýggjur íblástur og spurningar í hesum sambandi. Foreldrini møttu væl upp til fráboðaða fundin og fingu eina frágreiðing um gongdina, bæði verkliga og námsfrøðiliga partin, og síðani greiddi eg frá foreldraráðstevnuni og spurdi, um tað kanska var eitt hugskot, at tey gjørdust “rættir” brúkarar sum húski. Tey svaraðu ikki greitt “ja”, men heldur ikki “nei”, við tí grund, at tey ikki gera so nógv brúk av møguleikanum, og so fór eg at *síggja tað*!!!! Eg legði upp til, at báðir møguleikarnir kundu verða til staðar, og at vit nú taka ráðstevnuna til hjálpar fyri at diskutera ein ætlaðan túr til Hetlands við flokkinum í maj-juni 2003, tá tey ganga í 7.flokki. Hesum tóku foreldrini væl undir við. Eg greiddi teimum eisini frá, at tá okkurt ávíst var at samskifta um, sum kanska hevði teirra áhuga, so lærdu tey eisini samstundis at gera brúk av hesum miðlinum. Hetta upplegg er síðani lagt á ráðstevnuna hjá foreldrunum, men bert eitt foreldur hevur svara

mær gjøgnum E-post, hetta hóast eg havi biðið næmingarnar um at heita á foreldrini um at hyggja inn hagar.

Sannleikin er, at vit hittast í tí dagliga í fleiri øðrum førum, t.d. í handlum, ítrótti og fimleiki og á gøtuni, so hetta er ein heldur "kunstig" støða at *skula* nýta Internetið enn, tí fólk eru ikki so heilt von at gera brúk av hesum møguleikanum undir øðrum umstøðum enn heldur, hóast hetta uttan iva kann gerast ein skjótur og meiri óformellur máti at fáa samband við læraran ella skúlan uppá eins og í øðrum umstøðum við. Enn er tað meiri *stuttleikin* og *felagsskapurin* í hesum, sum drívur verkið. Tað var í veruleikanum eisini ov seint *nú* at fara at broyta brúkaranavn og loyniorð hjá foreldrunum, mátti eg ásanna. Eina aðru ferð *skal* hetta verða frá byrjanini.

#### 3.1.13.3 Nýggj heimasíðan

Nú var eg aftur burturstødd í arbeiðsørindum í eina viku, men næmingarnir og eg avtalaðu, at tey, sum høvdu hug, "chattaðu" sum vant mikukvøldið, og eg lovaði at senda teimum teldupost úr London. Tað einu vikuna, sum eg var burtur, var eg á skeið í FrontPage, og tá gjørdi eg flokkinum eina aðra heimasíðu, sum er at síggja á www.skulin.fo/sand/deirdre/5B Næmingarnir hava sæð hesa síðuna, men vit halda fram við hinari gomlu, fyri ikki at forvirra meiri enn neyðugt.

#### 3.1.13.4 Stuðul frá foreldrum

Eg sá hesa tíðina, at onkur aktivitetur var á ráðstevnuni, tó ikki tað nógva. Men eitt foreldur sendi okkum E-post úr Onglandi, har hann var á skeið í enskum og kom enntá heim við bóklingum um skeið í enskum fyri børn í hesum aldrinum. Ein annar pápi sendi eisini E-post og spurdi, hvar umsóknin um stuðul til teldukeyp til flokkin var blivin av. Eg gjørdi so í samráð við flokslæraran eina umsókn til 3 virki, sum foreldur í flokkinum umboða og allir næmingarnir skrivaðu undir umframt vit. Pengarnir komu dagin eftir frá hesum sama foreldri inn á konto hjá flokkinum! Hetta er ein neyðloysn, um tað gerst veruleiki, tí eg vildi heldur, at telduviðurskiftini sum heild vóru í lagi á øllum skúlanum.

#### 3.1.13.5 "Chattið"

Sigast má at avtalaða "chattið" hevur gingið væl, flestu næmingarnir hava, um ikki hvørja ferð, so javnan verið við í hesum. Tað kláraðu vit so nøkulunda at halda fast við. Men har til er at siga, at sjálvt innihaldið av hesum "chatti" er ikki júst tað, ein sum lærari kann "jubla" um. Nógvar styttingar og nærmast fjákut orð verða brúkt, eitt nú "ASL", sum stendur fyri "age, sex, location", ið onkur

teirra hevur lært á øðrum “chatt-kanalum”.

Men “chattið” gav okkum sum flokki nakað at verða saman um *javnan* í hesum tíðarskeiði og lærdi eisini næmingarnar at gera brúk av First Class. Bólkatrýstið – tað at hini eru við – fær eisini fleiri at vilja koma uppí, og so hava tey tað til felags at práta um í skúlanum og við meg sum lærara.

#### 3.1.13.6 Kalendarin!!

Seinasta hugskoti í samband við hesa verkætlan um samskifti um Internetið millum heim og skúla var at fara undir at gera brúk av “kalendaranum”. Í First Class ráðstevnuskipanini er møguleiki fyri at hava ein persónligan kalendara og so eisini kalendarar í teimum ymisku ráðstevnunum. Brúkarin ger so av, hvør ið fær atgongd til eins egna kalendara, meðan øll, ið sleppa inn á ráðstevnuna, sleppa eisini inn á kalendaran har, tó ikki við øllum rættindum. Tankin hjá mær var, at vit fingu ein kalendara inn í næmingaráðstevnuna, sum eisini sást í foreldraráðstevnuni. Hesin kalendari skal so brúkast at leggja boð um heimaarbeiði til hvønn dagin og eisini onnur boð, sum viðkoma flokkinum, so sum føðingardagar, nær ein lærari er burturstaddur e.l.

Kalendarin fyri flokkin er lagdur í næmingaráðstevnuna og riggar væl, men vit hava ikki havt stundir at roynt hann nóg væl, hetta skuldi eisini verið við frá fyrstan tíð av, men tá var “kalendarin” eisini eitt so nýtt fyribrigdi. Hetta letur seg tó væl gera, at um ein telda við góðum Internet-sambandi stóð í flokkinum, og lærarin so skrivar heimaarbeiði inn í kalendaran, hvørja ferð hann gevur fyri, umframt at næmingarnir skriva í lektiubók sína, so kunna foreldrini hyggja inn í kalendaran, um tey ivast um heimaarbeiði ella um barn teirra hevur verið burtur ein dag.

#### 3.1.13.7 Endin á verkætlanar tíðini.

Nú, ið royndartíðin er liðin, so hava flokkurin, flokslærarin og eg verið enn einaferð í teldustovuni í Runavík. Vit tosaðu eitt sindur um gongdina og royndu aftur tær ymisku funktiónirnar í First Class, eisini “kalendaran”, og tað var einki at ivast í, at næmingarnir eru glaðir fyri at hava verið við í hesari royndini.

“Ups”, helt tann eini næmingurin fyri, “nú fer ikki longur at bera til at siga við mammu, at eg einki havi fyri heima”!

Flestu næmingarnir hava skilt og duga at greiða øðrum frá, hví tey hava verið við í hesari verkætlanini, og tað sigur mær, at hetta kann gerast ein gongd leið framyvir. Lítil dugur er í, um bert *eg* helt hetta verða spennandi.

Sum ein endi á sjálvari verkætlanini, so er ætlanin at senda foreldrunum, leiðsluni og flokslæraranum eitt skriv, har eg í stuttum greiði frá gongdini, nevni "funktiónirnar" og Internetadressurnar enn einaferð og takki fyri stuðulin frá teimum, ið vónandi fer at verða við til at menna skúlan í Føroyum.

#### 3.1.13.8 Leiðslan

Tað hevur verið sera gott, at leiðslan á skúlanum hevur verið vitandi um gongdina í verkætlanini, tað hevur givið vælvild frá teirra síðu. Bert fyrsta frágreiðingin varð skrivlig og innibar umbøn um teldu og Interentsamband til flokkin. Annars hava vit javnan tosa saman um gongdina. Hendan verkætlan hevur eisini verið við til at givið onnur "skump", so sum diskusión um telduviðurskifti á skúlanum á Glyvrum, um fast og tráleyst samband til teldur á skúlanum, og heimasíðan hjá skúlanum er dagførd við flokssíðum, har møguleiki er at senda næmingum teldupost. Leiðslan er ikki nøgd við telduviðurskiftini á skúlunum, men alt strandar í peningajáttan og samskifti við kommununa um sjálvan skúlabygnaðin. Hesi viðurskifti eru tikin upp.

## *3.2 Námsfrøðiligi parturin*

- Hvørjar lógir, hvørji álit og viðurskifti stuðla einari slíkari roynd, og hvørji viðurskifti kunnu gera, at royndin kann gerast veruleiki?
- Hvørjir tankar eru frammi í tíðini um KT í undirvísingini?

### 3.2.1 Brot úr fólkaskúlalógini

Hesi brotini úr fólkaskúlalógini heimila eftir mínum tykki slíkari verkætlan:

§ 2. Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.

Stk. 2. Fólkaskúlin eigur at skapa sovorðin líkindi fyri uppliving, virkishugi og djúp-hugsan, at næmingarnir kunnu menna sína sannkenning, sítt hugflog og

hug til at læra, og at teir kunnu venja síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan og búnast í treysti til sín sjálvs og til teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum.

*Stk. 3. Fólkaskúlin skal í sátt og samvinnu við foreldrini* hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling. Hann skal við støði í heimligari mentan menna kunnleika næminganna um føroyska mentan og hjálpa teimum at fata aðrar mentanir og samspæl manna við náttúruna. *Hann skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.*

§ 3 Innan fyri settar karmar hevur tann einstaki skúlin *ábyrgdina av undirvísingardygdini* sambært endamáli fólkaskúlans, smb. § 2, og innan fyri hesar karmar ger skúlin av, hvussu hann skipar og leggur sína undirvísing til rættis.

Stk. 2. Skúlin samstarvar við næmingar og foreldur um at megna tað, sum er ásett í endamálsgrein fólkaskúlans.

### 3.2.2 Kunningartøkni í fólkaskúlanum

Í nýggjastu fólkaskúlanlógini frá 20.juni 1997, er einki beinleiðis at finna um kunningartøkni í undirvísingini í fólkaskúlanum.

Í "Áliti um nýggja fólkaskúlalóg, løgd fram av Ráðleggingarnevnd Fólkaskúlan, Landsskúlafyrisitingin 1996," verður í §5, 2.stk. sagt:

" Í teimum Leiðbeinandi lesiætlanum ( tí yrkisliga partinum) verður teldan av ráddum huga mestsum bara umrødd í eini sjálvstøðugari grein.

Orsøkin til tess er, at tað verður hildið neyðugt hjá fólkaskúlanum at geva tí uppvaksandi ættarliðinum holla støðisvitan um teldu og teldunýtslu, so at tey kunnu verða *før fyri at nýta telduna sum eitt hóskandi hjálparamboð í gerandisdegnum.* Um hetta skal eydnast, so eigur teldan við sínum øktu møguleikum at gerast eitt *natúrligt hjálparamboð í tí dagligu undirvísingini í teimum lærugreinum og verkevnum, har teldunýtsla verður hildin at verða til fyrimunar fyri uppgávuloysnina.*

Við teimum samskiftis- og upplýsingarmøguleikum, teldan hevur, eru og verða frálíkir møguleikar at fjølskipa, fjølgreina og at dagføra undirvísingina, og um

rætt verður at borið, so kann teldunýtslan samstundis verða ein kveikjandi birtari, ið fremur menning og framgongd innan skúlagátt. Samstundis, sum *neyðugt verður at seta hóskandi krøv til undirvísingarmiðlarnar,* so eigur teldunýtsla í øllum teimum trimum høvuðspørtunum (hugmyndafrøðiligu, nattúruvísindaligu og skapandi/mennandi lærugreinirnar) natúrliga at verða umhugsað, tá ið ítøkiligu undirvísingarætlanir skúlans verða gjørdar."

Landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum setti 25.aug.1997 eina nevnd, KT-nevnd fólkaskúlans, at taka spurningin um kunningartøkni í fólkaskúlanum til viðgerðar. Henda nevnd kom við einum tilmæli og frágreiðing í mars 1998, nevnd: "Kunningartøkni í fólkaskúlanum." Nevndin kannaði táverandi støðuna á telduøkinum í skúlunum kring landið og kom við tilmæli um at skipa ein røð av lutmálum við tilhoyrandi virkisætlan, tíðarásetingum og útreiðslutørvi. Í álitinum verður nevnt, at avgerðin um, at Føroyar skulu verða eitt kunningarsamfelag, er tikin. Tí eigur eitt høvuðsmál at verða, at KT skal verða ein sjálvsagdur liður í undirvísingarheildini í fólkaskúlanum, soleiðis at *næmingarnir koma at kenna KT sum eitt læritól, eitt samskiftistól og eitt leititól.*

Kunningartøkni í skúlanum er við til at flyta *tað at læra* frá í mestan mun at verða í "auditorium" til at verða meiri í "labratorium". Erik Prind nevnir í bókini, "Rum til læring,"(1999), trý ymisk læringsrúm, undirvísingarrúmið, venjingarrúmið og lestrarrúmið, sum hvør í sínum lagi hava brúk fyri ymiskum møguleikum innan KT.

Nógv størri dentur verður lagdur á næmingalagaða undirvísing, og størri dentur verður eisini lagdur á, at næmingurin má taka *ábyrgd av egnari innlæring*. Fyri at stuðla hesum verður hildið, at *logbók* eigur at verða førd, soleiðis at næmingurin í samráð við lærara og foreldur sjálvur betri er førur fyri at meta um egna innlæring, støði og úrslit.

Tá eitt barn í dag hevur atgongd til teldu og Internetið, hevur tað ikki bert "fysisku" karmarnar heima við hús, í skúlanum o.a., so sum vit kendu hetta frá barnaárum, men eisini *eitt "virtuelt" stað*, har tey fáa roynt *aðrar spælimøguleikar og annan felagsskap*. Har fáa tey *styrkt sín "identitet"* á annan hátt, enn vit fingu gjørt tað, við tað at tey kunnu "chatta", vitja heimasíður og senda og fáa teldupost. Teldan er eitt gott og fjølbroytt skriviamboð, men møguleiki er eisini fyri at gera verkætlanararbeiði, ið fer tvørtur um landamørk og soleiðis fáa beinleiðis innlit í aðrar mentanir, kanska enntá við hjálp av fremmandum máli. Lærarin gerst sostatt meiri ein, ið setir næmingarnar í gongd og ein vegleiðari inni í hesum undirvísingartímunum, og má tí eisini fyrireika

seg øðrvísi til tímarnar enn til vanliga floksundirvísing, so sum vit kenna hana best.

Vit eru sostatt farin í holt við eina “multikommunilatión”:

“Kommunikatíon spiller en fundamental og afgørende rolle for menneskeligt samvær og er en forudsætning for, at vi overhovedet kan tale om en kultur og et samfund. Samtidig angiver et samfunds kommunikationsformer på hvilket historisk udviklingsniveau et samfund befinder sig. - Multikommunikation, som inddrager elementer fra både den interpersonelle og massekommunikerende form, bryder med ovennævnte todeling af kommunikationsformer og “har relevans i et fremtidsrettet mediadidaktisk perspektiv”. (Birgitte Holm Sørensen, Medier på begyndertrinnet, 1994).

Steen Larsen, dr.pæd, lektor í sálarfrøði sigur í bók síni, IT og nye læreprocesser: ”Det er *ikke økonomien, der holder den ny informationsteknologi ude af uddannelsessytemet, men de traditionelle undervisningsformer*, der stadig hersker næsten overalt. IT blev født i laboratoriet, og derfor har den intet at gøre i auditorierne. Sætter man bare strøm på de gamle metoder ved at overføre dem til harddiske og CD-rom, vil IT blot fungere som en konservering af for længst udtjente undervisningsformer. Det er desværre nok den indstilling, der er den almindeligste netop nu, hvor man råber på 'gode undervisningsprogrammer'. Men IT rummer langt videre perspektiver. Den er som en trojansk hest: indeni ligger kimen til helt nye læreprocesser, der kan revolutionere det undervisnings- og uddannelsessystem, der snart overalt er nedslidt i østeuropæiske dimensioner. Men det kræver, at IT får mulighed for at udfolde sine egentlige potentialer.”

Hesin sami Steen Larsen sigur eisini:

”Facination af IT mediet. Midaldrende facineres ofte af selve mediet, fordi de har oplevet mediet blive opfundet og kan huske, hvordan det var førhen. Derfor bliver mediet ofte et mål i sig selv. Ideelt bør mediet blive ”usynligt” (som f.eks. selve TV apparatets kabinet bliver det, når man ser en god film.) De unge er vokset op med mediet. De er derfor ikke facineret af selve mediet, men derimod optaget af, hvad mediet kan bruges til. IT skal ikke være et mål i sig selv, men et middel til at lave en bedre undervisning. Man skal ikke sætte strøm på et forældet undervisningsmateriale.”

Hesi brot vísa, at vit sum *undirvísarar í fólkaskúlanum mugu kunnast, útbúgvast og fáa møguleika fyri at fylgja við í KT*, fyri at gerast betur før fyri at læra næmingarnar at gera brúk av hesum hentu amboðunum .

### 3.2.3 Nøkur orð um foreldrasamstarv

Sum nevnt í skúlalógini, so skal samstarv verða um næmingin millum heim og skúla. Hetta samstarv er nógv broytt seinastu árini til tað betra, men enn er langt á mál. Í Føroyum eru vit í skúlahøpi júst farin í gongd við at gera ársætlanir, og ein menningarætlan er í mars 2001 send øllum skúlum landsins. Men vónandi koma skúlamyndugleikarnir í Føroyum við einum almennum skúlapolitikki, har útgreinað verður, hvat ið hugsað verður um og hvørji krøv eru t.d. í samband við foreldrasamstarv og í samband við kunningartøkni í fólkaskúlanum. Hesin skúlapolitikkur kundi so verið lagaður til einkulta skúlan, so sum dømi niðanfyri vísir. Hyggja vit eitt sindur at, hvussu støðan er í grannalondum okkara, so verður stórur dentur lagdur á at menna skúlan og samstarvið millum heim og skúla.

Á hesari heimasíðuni www.f2000.dk , sum er gjørd um skúlaviðurskifti ár 2000 í Danmark í samstarvi við Undervisningsministeriet, Danmarks Lærerforening og Kommunernes Landsforening sæst, hvussu nágreiniliga øll skúlaviðurskifti verða tikin upp:

http://www.f2000.dk/f2000a/f2000.nsf/Dokumenter/7E785FECBAC82141C12568A500414F7D?OpenDocument

Forældre og skole
Det er et mål at styrke forældrenes medinddragelse i løsningen af skolens mangeartede opgaver, så det bliver et fælles ansvar at fremme elevernes tilegnelse af kundskaber og færdigheder og understøtte deres personlige udvikling.
Det er et mål at øge forældrenes engagement i deres børns skolegang. Der arbejdes med at forstærke informationen over for forældrene om undervisningens indhold, pædagogiske aktiviteter, metoder og organisering og øge dialogen om hele skolens liv.
Det er et centralt element i skole/hjem samarbejdet, at skolen og forældrene drøfter deres gensidige forventninger til hinanden.
Den enkelte skoles ledelse, medarbejdere og skolebestyrelse arbejder med at videreudvikle et gensidigt forpligtende skole/hjem samarbejde, der hviler på åbenhed og tillid, og som skolebestyrelsen fastlægger principper for.

http://www.f2000.dk/f2000a/f2000.nsf/Dokumenter/Alle/NT00003392

*Brot úr:* ***Skole-hjemsamarbejde – Rudkøbing skole.....***
*Målene for skole-hjemsamarbejdet er:*
*Åbenhed og ærlighed med hensyn til:*
*Skolens forventninger til elever og forældre*
*Elever og forældres forventninger til skolen*
*Gensidig tillid med hensyn til:*
*Respekt for det enkelte menneske (elever - forældre - lærere)*
*Ansvarlighed hos alle parter (elever - forældre - lærere)*
*Højt informationsniveau med hensyn til:*
*Skolens undervisningstilbud*
*Skolens omgangsform*
*Skolens økonomiske rammer*
*Skolens kvalitetskrav*

Tað at hava eitt gott foreldrasamstarv, er ikki nakað ein byggir upp frá einum degi til annan. Hetta er eitt álit millum partarnar, sum tekur tíð at byggja upp. Fleiri foreldrafundir, hugnakvøld, foreldrasamtalur og samtalur við næmingarnar eru á vegnum, umframt vanligu undirvísingina. Hendan verkætlan hevði ikki havt so góðar umstøður at virka undir, um ikki foreldrasamstarvið var gott frammanundan. Tað byrjaði longu móti sumri tað árið, næmingarnir skuldu í fyrsta flokk. Tá vóru næmingarnir og foreldur teirra boðin í skúlan at hitta flokslæraran og at vitja táverandi fyrstaflokk, sum framførdi okkurt fyri teimum. Longu tá fingu foreldrini og næmingarnir greitt at vita, at vit sum skúli ynsktu at fáa eitt gott samstarv við tey, fyri at næmingarnir skuldu trívast og fáa sum mest burtur úr í skúlanum.

Síðani hava vit sum lærarar á skúlanum fingið álagt at gjørt eina ársætlan fyri flokkin, árgangin og skúlan, har m.a. verður fastlagt, hvussu og nær vit skulu hitta foreldrini. Hetta var eitt stórt framstig fyri skúlan, tí áðrenn hetta vóru fleiri lærarar, sum vildu hava minst møguligt við foreldrini at gera - og umvent við!

Tað er tó ein óskrivað javnvág millum, nær tað er ov lítið -, passaligt - ella ov nógv foreldrasamstarv. Hetta veldst um, hvat innihaldið á samstarvinum er. Men foreldur mugu til eina og hvørja tíð vita, at tey eru vælkomin at seta seg í samband við flokslæraran ella skúlan um viðurskifti, sum hava við teirra barn, undirvísingina og skúlan sum heild at gera.

## 4. Eftirmeting

Samskifti um Internetið kann verða við til at styrkja sambandi millum heim og skúla. Hetta er ein frálíkur møguleiki hjá foreldrum, lærarum og næmingum at koma í samband við hvønn annan, kanska eisini á einum minni "formellum" støði, enn um tú sum foreldur ringir til læraran ella skúlan. Her er jú møguleiki fyri at leggja eini boð til flokkin ella til ávísan persón, hyggja um heimaarbeiði, føðingardagur ella onnur serlig tiltøk eru. Ársætlanin, tímatalvan og frídagar kunnu jú eisini liggja á heimasíðuni, sum her, ella møguliga eisini í sjálvari First Class ráðstevnuskipanini! Hyggur tú at heimasíðuni hjá Runavíkar Kommunuskúla www.rks.fo , so sæst, at ikki stórvegis broytingar skula gerast, um hetta sama, sum eg her havi roynt, gerst møguligt fyri allar flokkarnar. Sum er, so er longu gjørligt at senda øllum næmingunum teldupost um First Class ráðstevnuskipanina. Hetta kom m.a. sum ein avleiðing av hesari verkætlanini. Eftir er bert at læra næmingarnar í barnaskúlanum frá 1.-7.flokk at gera brúk av hesum møguleikanum, men her er væntandi telduútgerð ein forðan.

Um øll foreldur skulu gerast brúkarar í First Class, er ein spurningur, sum KT-depilin má verða við til at avgera, men tað letur seg væl gera, hóast tað økir munandi um arbeiði hjá KT-deplinum og teimum, sum skula læra foreldrini at gera brúk av hesari funktiónini. Tí kundi nógv av hesum verið á einari heimasíðu, tó uttan ráðstevnur. Hesar vóru tó tað tyngsta at fáa fólk í gongd við at brúka, hóast hetta uttan iva er ein gongd leið í framtíðini. Fleiri og fleiri vaksin gerast jú brúkarar av teldu, Interneti, heimabanka og ráðstevnuskipanum í samband við arbeiði teirra. Tey foreldur í hesum flokkinum, sum vóru von við at gera brúk av hesum møguleikum í teirra egna arbeiði, vóru eisini tey, ið gjørdu mest við at brúka *okkara møguleika* í 5.b.

Spurningin um ”net-sið” ella ”net-skikk” havi eg valt ikki viðgera í hesari verkætlanini, men sjálvandi ”vænti” eg, at næmingar og foreldur nýta sama hampuliga tóna við hvørt annað á netinum, sum tá vit umgangast til dagligt. Skal tað tó eydnast at fáa nakað munagott burtur úr at samskifta um Internetið, so krevst tað, at lærarar, næmingar og foreldur sýna hvørt øðrum virðing og vanda sær væl um orðini.

## 5. Endi

At enda vil eg taka undir við Torbirni Jacobsen, mentamálaráðharra, í tí hann segði í fyrstu røðu síni á tingsins røðarapalli:

“Fólkaskúlin er grundarlagið undir allari kenslu. Tí er tað av avgerandi týdningi, at hann verður røktur sum ein urtagarður. Og tað krevur sál, førleika og arbeiðshug. Skal fólkaskúlin framhaldandi verða kensluvøggan hjá flestu føroyingum, so er tað alneyðugt, at hann áhaldandi verður røktur, endurskoðaður samsvarandi tíðini.”

Hesin ”urtagarður” hevur tørv á nógvari røkt, og lættasti mátin er at seta sær nøkur mál, sum skula røkkast innan ávíst tíðarskeið. Hesi mál kunnu ásetast av næmingum, foreldrum, lærarum, leiðslum á skúlunum og ikki minst av skúlamyndugleikunum. Tí hevur tað eisini týdning, at foreldrini kenna umstøðurnar og tørvin í skúlunum.

Um telduviðurskiftini á skúlunum vóru í lagi, so varð eisini lættari at farið til verka við næmingunum. Her hugsi eg serliga um okkara skúlar í Runavíkar kommunu, tí her hevur bert tann eini av 4 skúlum hóskandi telduútgerð, og tað er framhaldsdeildin í Runavík. Vilji næminganna skortar ikki at sleppa í gongd við ”henda náttúrliga arvtakaran hjá ídnaðarkollveltingini, tá ið um tekniska menning umræður.”

Trupult er at skapa fatan fyri týdningnum av, at fólkaskúlin er við á telduøkinum - eisini yngru næmingarnir. Sum nú er, er tað torført at fáa fígging frá kommununum til hesa stóru íløgu, sum tað í veruleikanum er at fáa og at halda hóskandi telduútgerð viðlíka á skúlunum.

Vónandi kann hendan verkætlanin verða eins og ”ringar á vatninum”, sum eru við til at gera, at teldan gerst eitt hent amboð í skúlunum í Føroyum.

## Styrkt KT í fólkaskúlanum

## - ein íløga í framtíð Føroya

## 6. Keldur

Fólkaskúlalógin 1997
Álit um nýggja fólkaskúlalóg, s. 63
KT-nevnd Fólkaskúlans: Kunningartøkni í fólkaskúlanum

Skúlablaðið sep.2000: Úr løgmansrøðuni: "Kunningartøkni" og úr "Girndin er ikki tokki.- sel ikki tokkan fyri girnd."

Pia Grúnbaum: Børn og Computere

Birte Ravn og Poul Svendsen: Forældresamarbejde i folkeskolen – hvordan?

Bent B. Andersen: skolen ITiden, - væsentlige elementer i en fortsat it-udbygning

Orfeus: Ringe i Vandet, Kommunikation via Skolekom s.65-74

Peter Ravnholt: Praktisk webmastering med FrontPage 98 (brúkt sum uppslagsbók)

First Class, føroysk vegleiðing, skipanin, ráðstevnur, E-postur, kalendari, "chatt"

Leinkjur av Interentinum - nevndar í uppgávuni:

www.rks.fo Heimasíðan Runavíkar kommunuskúli

http://www.rks.fo/kamap/flokk/5b.html Heimasíðan 5.b
www.skulin.fo KT-depilin
www.skulin.fo/sand/deirdre/5b Nýggj heimasíða 5.b
http://www.uvm.dk/nyt/pm0301.htm Undervisningsministeriet
http://www.kig.uvm.dk/Kvalitet/Vejledning/Tema/Skole/SkoleHjem/TemaIntro.asp?RETURNURL=%2FKvalitet%2FKlasse%2FMenu%2Easp%3FTemaID%3D162 Samarbeiði millum heim og skúla UVM
http://home4.inet.tele.dk/larsens/
http://www.computerworld.dk/vis_artikel.asp?ArticleID=10144 Um íløgur í KT í donskum skúlum
http://www.f2000.dk/f2000/f2000.nsf?Open Stevna um danskan skúlaskap hildin í ár 2000

http://www.f2000.dk/f2000a/f2000.nsf/Dokumenter/7E785FECBAC82141C12568A500414F7D?OpenDocument

Stevna um danskan skúlaskap hildin í ár 2000
http://www.f2000.dk/f2000a/f2000.nsf/Dokumenter/Alle/NT00003392
Stevna um danskan skúlaskap hildin í ár 2000
http://www.daks.dk/daks-web/skoler/kaer/ sí m.a. teldupolitikkur